MÁLRÁÐIÐ

øll eiga málið

# ÁRSFRÁGREIÐING 2020

**Innihaldsyvirlit**

| | |
|---|---|
| Innihaldsyvirlit | 2 |
| Endamál | 3 |
| Inngangur | 4 |
| Limirnir í Málráðnum | 5 |
| Starvsnevndin | 7 |
| Starvsfólk | 7 |
| Ráðgeving | 8 |
| Fundir í Málráðnum | 9 |
| Tíðindabræv | 10 |
| Nýggj orð | 10 |
| Stavsetingarorðabókin | 11 |
| Talgild orðtøka | 11 |
| Hendingar í 2020 | 12 |
| Roknskaparárið 2020 | 12 |

**Endamál**

Málráðið hevur sum endamál at røkja, menna og verja føroyska málið, at vegleiða, ráðgeva og gera niðurstøður í málspurningum og at áseta føroyska stavseting. Málráðið skal savna og skráseta nýkomin orð, máliskur, framburðir og onnur málslig fyribrigdi í føroyskum og skal vera til hjálpar at velja og evna til nýggj orð.

Málráðið gevur landsstovnum og almenninginum vegleiðing, ráð og upplýsing um føroyskt í talu og skrift. Almennir myndugleikar eiga í størst møguligan mun at fylgja niðurstøðunum hjá Málráðnum.

Eisini kunnu stovnar og einstaklingar venda sær til Málráðið við spurningum. Málráðið eigur at samstarva við fjølmiðlar, stovnar og almennar myndugleikar, ið hava stóra málsliga ávirkan. Í sambandi við yrkisbólkar skal Málráðið menna gott føroyskt yrkismál og annars skipa fyri átøkum málinum at frama.

Málráðið ritstjórnar og greiðir til útgávu eina føroyska stavsetingarorðabók, sum landsstýrismaðurin løggildir. Almennir myndugleikar hava skyldu at fylgja ásetingunum í stavsetingarorðabókini.

Málráðið er málrøktar- og málmenningarstovnur, skipaður undir landsstýrinum og í virksemi sínum óheftur av politisku skipanini.

**Inngangur**

Árið 2020 hevur í mangar mátar verið serligt, eisini hjá Málráðnum. Skrivari ráðsins, Marius Staksberg, fór frá við eftirløn á ársins fyrsta degi eftir at hava røkt starvið til lítar í fleiri enn tjúgu ár. Fráfaringarhald við røðum og tónleiki varð hildið í loftsstovuni á Føroyamálsdeildini 24. juni 2020.

Á grækarismessu boðaði Føroya løgmaður frá, at Føroyar, eins og meginparturin av øllum heiminum, skuldu niður í ferð. Lítið virksemi var tí í Málráðnum og á Málstovuni várið og summarið 2020. Eftir summarsteðgin kom tó ferð á aftur, og Ragnar Sigrunarson byrjaði 1. august í starvi sum málsligur ráðgevi og samskipari.

Tveir málráðsfundir vórðu hildnir á heysti í 2020. Til viðgerðar vóru m.a. reglan frá 1954 um burturfall av dupultum hjáljóði í sambandi við faðirsnøvn og ymsir spurningar í sambandi við stavseting av fremmandaorðum.

Aðalendamálið hjá Málráðnum er at røkja, menna og verja føroyska málið. Tað er ásett við lóg, at Málráðið skal geva út stavsetingarorðabók, ið verður løggildað, og stórur partur av virkseminum hjá Málráðnum er beinleiðis tongdur at arbeiðinum við nýggju *Stavsetingarorðabókini*.

Hetta er áttanda ársfrágreiðing hjá Málráðnum síðan stovnanina 1. januar 2013 og fjórða ársfrágreiðing hjá sitandi Málráði. Ársfrágreiðingarnar eru at finna á heimasíðu okkara malrad.fo.

*Sólvá Jónsdóttir, forkvinna*

## Limirnir í Málráðnum

***Sólvá Jónsdóttir**, forkvinna*



Ráðgevi, Hósvík

Vald eftir tilmæli frá Námi

***Bergljót av Skarði***



Cand. mag., Tórshavn

Vald eftir tilmæli frá Rithøvundafelagnum

***Eivind Weyhe**, næstformaður*



Lektari emeritus, Tórshavn

Valdur eftir tilmæli frá Staðarnavnanevndini

***Elin Henriksen***



Lærari, Strondum

Vald eftir tilmæli frá Móðurmálslærarafelagnum

***Anfinnur Johansen***



Lektari, Hoyvík

Valdur eftir tilmæli frá Navnanevndini

***Hanna Simonsen***



Fulltrúi, Tórshavn

Vald eftir tilmæli frá Kommunusamskipan Føroya

***Høgni L. Højgaard***



Næstformaður fyri Deyvafelag Føroya
Valdur eftir tilmæli frá Deyvafelagi Føroya og Felagnum fyri hoyribrekað í Føroyum

***Randi Meitil***



Miðnámsskúlalærari, Tórshavn
Vald eftir tilmæli frá Málfelagnum

***Jógvan D. Hansen***



Cand. phil., Svínáum
Valdur eftir tilmæli frá landsstýriskvinnuni

***Sjúrður Gullbein***



Cand. phil., Tórshavn
Valdur eftir tilmæli frá Fróðskaparsetri Føroya

***Marna Jacobsen***



Ritstjóri, Sørvági
Vald eftir tilmæli frá Føroya lærarafelag og Javnstøðunevndini

***Sólfinn Hansen***



Cand. mag., Fuglafirði
Valdur eftir tilmæli frá landsstýriskvinnuni

**Starvsnevndin**

Starvsnevndin er mannað við hesum limunum í Málráðnum: Sólvá Jónsdóttur, forkvinnu, Eivindi Weyhe, næstformanni, Anfinni Johansen, Bergljót av Skarði og Elini Henriksen.

**Starvsfólk**

Málstovan er skrivstovan hjá Málráðnum, og har starvast:



***Kristin Magnussen**, málfrøðingur*

kristin@malrad.fo

312397



***Ragnar Sigrunarson**, málsligur ráðgevi*

ragnar@malrad.fo

312397

**Ráðgeving**

Málstovan veitir stovnum og einstaklingum málsliga leiðbeining. Øll eru vælkomin at skriva til Málstovuna á malrad@malrad.fo ella at ringja á 312397.

143 spurningar vórðu svaraðir í 2020, meðan 288 vórðu svaraðir í 2019. Hetta er ein minking upp á 50,3%, sum stendst av, at fulltíðarstarvið sum *skrivari* varð umskipað til hálvtíðarstarv sum *málsligur ráðgevi og samskipari*, umframt at starvið var leyst til august 2020.




Í fjør snúðu 17% av spurningunum seg um stavseting, 27% um mállæru, 8% um málbering, 42% um týðing, og 7% snúðu seg um annað.




Í fjør vóru 12% av spurningunum telefonspurningar, og 88% vóru telduspurningar. Hetta lutfallið er øvut av lutfallinum í 2001 og vísir eina greiða gongd frá telefon til teldu.

**Fundir í Málráðnum**

Í 2020 vóru tveir fundir í Málráðnum, hin 10. septembur og hin 19. novembur.

Á málráðsfundinum í septembur varð Bergljót av Skarði vald í starvsnevndina fyri Marnu Jacobsen, ið segði sessin frá sær. Valið fór fram við loyniligari, skrivligari atkvøðugreiðslu.

Á sama fundi varð samtykt, at faðirsnøvn verða løgd aftur at undantøkunum í stavsetingarregluni frá 1954, ið sigur, at „av tveimum eins hjáljóðum dettur annað burtur framman fyri triðja hjáljóði fremst í bendingarending ella í orðasmíðsending.“ Hetta merkir ítøkiliga, at ein hvørsfalsformur varð lagdur aftur at núverandi bendingarmynstri hjá mansnøvnum, ið hava tvífalt hjáljóð framman fyri bendingarendingina *-s* í hvørsfalli. Eitt dømi er navnið *Oddur*, ið fyrr bendist Oddur, Odd, Oddi, Ods og nú bendist Oddur, Odd, Oddi, Ods/Odds. Faðirsnavnið verður sostatt *Odsson* ella *Oddsson*.

Í sambandi við arbeiðið við Stavsetingarorðbókini varð samtykt at broyta stavsetingina av bendum sniðum av sagnorðunum *keikja*, *sleikja* og *steikja*, soleiðis at *-ei-* verður *-o-* í tátíð (*keikti* > *kokti*) og lýsingarhátti (*keikt* > *kokt*). Í hesum høpi verður stavsetingin av

lýsingarorðinum *seigligur* broytt til *sogligur* og hjáorðinum *seigliga* til *sogliga*. Tvær grundgevingar eru fyri broytingini. Hin fyrra er, at broytingin longu er gjørd í t.d. *heingja* (hongdi, hongt), *steingja* (stongdi, stongt), *sleingja* (slongdi, slongt) og *leingja* (longdi, longt). Hin seinna grundgevingin er, at broytingin lagar stavsetingina til framburðin í talumáli (*slokti*, *stokti*) og á henda hátt forðar fyri, at núverandi taluframburður víkur fyri lesiframburði (*sleikti*, *steikti*).

Á málráðsfundinum í novembur varð samtykt at loyva sniðinum *slókna* eins væl og sniðunum *slokna* og *sløkna*. Sniðið *slokna* er upprunafrøðiligt (etymologiskt), meðan *sløkna* er komið av samjavnaði (analogi) við *sløkkja*. Sniðið *slókna* er hvørki í samsvari við upprunafrøði ella samjavnað, men *slókna* er einasta sniðið, sum rúmar framburðinum norðanfjørðs og sunnanfjørðs, og sniðið við -*ó*- hevur harafturat hægri tídd (frekvens) enn sniðini við ávikavist -*o*- og -*ø*-. Áskoðanirnar í Málráðnum vóru í ymiskar, og orðaskiftið snúði seg fyrst og fremst um, hvussu uppruni, framburður og tídd verða raðfest, men tá ið av tornaði var breið semja um broytingina.

**Tíðindabræv**

Í desembur setti Málstovan sjøtul á eitt tíðindabræv, sum fyrst og fremst er ætlað ritstjórum, rættlesarum og øðrum yrkisfólki. Tó eru øll, sum eru áhugað, vælkomin at tekna seg á heimasíðuni hjá Málráðnum. Tíðindabrøvini, sum Málstovan higartil hevur sent haldarum, eru til skjals á malrad.fo > tíðindabræv > áður send tíðindabrøv. Tíðindabrævið verður einans nýtt til málsligar dagføringar, og tí verður ikki lýst við tiltøkum o.tíl.

**Nýggj orð**

Hesi orðini vórðu løgd aftur at Nýggjorðalistanum í 2020.

| | |
|---|---|
| **forsøgin** *l* | da. *forudsigelig* |
| **forsøgni** *h* | da. *forudsigelighed* |
| **hugborð** *h* | en. *mood board* |
| **lærumyndugleiki** *k* | da. *magisterium* |
| **margháttur** *k* | en. *multimodality* |
| **samdráttur** *k* | da. *koncentrat* |
| **smátalarar** *k flt* | en. *headphones* |

| | |
|---|---|
| **staðskiman** *kv* | en. *location scouting* |
| **staðskoðan** *kv* | en. *tech recce* |
| **teldulig hugsan** *kv* | en. *computational thinking* |
| **úrbregðandi** *l* | da. *mutagen,* en. *mutagenic* |
| **úrbregðil** *k* | da. *mutagen* |
| **vanstaddur** *l* | da. *udsat* |
| **viðkyndur** *l* | en. *cisgender*, da. *ciskønnet* |
| **vónarveitsla** *kv* | en. *baby shower* |

Summi av orðunum vóru til frammanundan, t.d. *smátalarar*, *viðkyndur* og *vónarveitsla*, meðan onnur eru nýyrði frá Málstovuni, t.d. *forsøgni* og *hugborð*. Uppaftur onnur eru nýyrði, sum spyrjarar sjálvir hava smíðað, t.d. *vanstaddur*.

**Stavsetingarorðabókin**

*Stavsetingarorðabókin* er orðabók, sum Málráðið ritstjórnar og gevur út, og sum landsstýrisfólkið í mentamálum løggildar. Hetta merkir, at allir almennir stovnar hava skyldu at fylgja ásetingunum í *Stavsetingarorðabókini*. Umframt stavseting ásetur orðabókin teknseting, bending, kyn og sjálvt stavraðið. *Stavsetingarorðabókin* er grundað á *Føroyska orðabók*, ofta nevnd *Móðurmálsorðabókin*. *Stavsetingarorðabókin* er ætlað at lýsa føroyskt nútíðarmál, og tí verða summi orð í *Móðurmálsorðabókini* sáldað frá, m.a. ávís orð úr kvæðamáli, meðan onnur nýggjari orð, sum ikki eru skrásett í *Móðurmálsorðabókini*, verða løgd aftur at *Stavsetingarorðabókini*. Ein ritstjóri á Málstovuni varðar av orðabókini saman við einum fylgibólki, sum Málráðið setur.

Arbeiðið við *Stavsetingarorðabókini* gongur framá. Við ársenda vóru uml. 1000 leitorð eftir av savninum hjá *Føroyskari orðabók* at viðgera í fylgibólkinum. Uml. 65.000 leitorð eru higartil í *Stavsetingarorðabókini*. Arbeiðið komandi tíðina verður at fáa nýggjari orð umframt rættingarnar, sum eru gjørdar í fylgibólkinum, førd inn í orðabókina.

**Talgild orðtøka**

Málráðið hevur tikið stig til talgilda orðtøku á netinum. Arbeiðið verður gjørt í samstarvi við Sigmund Vestergaard. Endamálið við talgildu orðtøkuni er at skapa umstøður at dagføra føroysku orðabøkurnar við samtíðarorðum, og samstundis fáast upplýsingar um nútíðarføroyskt mál, eitt nú um tídd (hvussu ofta eitt orð verður nýtt), stavseting,

samanseting og málkyn (hvat málsligt kyn orðið fær). Allar dátur, sum verða savnaðar, geva okkum á Málstovuni og teimum á Føroyamálsdeildini eina greiðari mynd av okkara livandi móðurmáli, og tí er talgilda orðtøkan ómetaliga virðismikil. Væl grundaðar upplýsingar um, hvussu føroyingar í roynd og veru skriva, eru alneyðugar fyri nútíðarhóskandi orðabókagerð.

**Hendingar í 2020**

Ársins orð varð kosið í beinleiðis útvarpssending 04. desembur, og tað gjørdist *sóttarhald*.

Í 2020 varð avtala gjørd við Uttanríkis- og mentamálaráðið um, at UMMR umsitur bókhaldið hjá Málstovuni, og við Fróðskaparsetur Føroya um kt-stuðul. Hetta samstarvið lættir munandi um arbeiðsbyrðuna hjá Málráðnum og letur Málstovuna hugsavna seg um málsliga ráðgeving og *Stavsetingarorðabókina*.

**Roknskaparárið 2020**

| | |
|---|---|
| *Játtan* | |
| Játtan | 1.265.000 |
| Munur | 30.000 |
| *Útreiðslur* | |
| Lønir | 1.124.000 |
| Vørur og tænastur | 41.000 |
| Útbúnaður | 20.000 |
| Leiga | 2.000 |
| Innanhýsis millum stovnar | 48.000 |
| Til samans | 1.235.00 |